# Samgongan skal viðgera skotlands-sigling hjá Smyrli

**Johan Dahl, løgtingsmaður, vil hava samgonguna at viðgera eitt mál, sum hevur verið ógvuliga umstrítt í føroyskum politikki**



*Johan Dahl vil nú hava samgonguna at viðgera eitt rættiliga umstrítt mál og tað er um tað almenna aftur skal fara undir fasta rutusigling ímillum Føroyar og Skotland við Smyrli og nýggja Smyrli*

ALMENN SKOTLANDSSIGLING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað almenna eigur at fara undir aftur beinleiðis sigling ímillum Føroyar og Skotland.

Tað heldur Johan Dahl, løgtingsmaður í Suðuroy.

Sum løgtingsmaður fyri sambandsflokkin, er Johan Dahl sostatt eisini í samgongu.

Og hann vil nú hava samgonguna at viðgera spurningin um at fara undir fasta rutusigling ímillum Føroyar og Skotland við Smyrli.

Johan Dahl vísur á, at fyrr var Suðuroyggin feskfiskaoyggj burturav, skilt á tann hátt, at fiskavirkini í oynni høvdu lagt seg eftir at skera útflyta fesk fløk.

Men hesi seinastu árini hevur hendan vinnan verið fyri heilt stórari aftur-gongd.

Fólk í fiskivinnuni siga, at orsøkin til afturgongdina var, at tað almenna gavst við siglingini ímillum Føroyar og Skotlands við Teistanum eftir stórum trýsti frá privatu flutningsfeløgunum.

Hinvegin siga tey eisini, at privatu flutningsfeløgini hava ikki megnað at lyft arvin eftir Teistan, tí tænasta, sum í hvussu so er virkini í Suðuroy hava fingið síðani, hevur ikki verið nóg góð.

Avleiðingin er, at flutningsmøguleikarnar hjá virkjunum í Suðuroy eru ikki nóg góðir til at tey kunnu gera seg galdandi á marknaðinum fyri fesk fløk.

Samstundis hevur vinnan meiri enn einaferð víst á, at skulu føroyingar gera seg galdandi á altjóða fiskamarknaðinum, mugu vit leggja okkum eftir at virka feskar fiskavørur. Jùst har eru vit serliga sterk, tí vit liggja mitt í fiskigrunnunum og bara nakrar fáa tímar siglingstíð frá marknaðinum.

Men til tað krevjast góðir flutningsmøguleikar og teir eru ikki til staðar í dag.

Men nú nýggjur Smyril kemur, hava summi vinnulívsfólk mælt til, at Smyril verður settur aftur í sigling ímillum Føroyar og Skotland, heldur enn at selja hann fyri einar 4-6 milliónir, sum landskassin hvørki doyr ella livir av.

### Kann lata nógvar dyr upp

Nú hevur tankin um at tað almenna skal taka skotlandssiglingina uppaftur, eisini fingið afturljóð hjá politiska myndugleikanum. Og samgongutingmaðurin, Johan Dahl, vil nú hava samgonguna at viðgera málið.

Sjálvur er hann heitur talsmaður fyri at landið tekur uttanlandssiglingina uppaftur.

– Skal Suðuroy verða lív lagað sum feskfiskaoyggj, er tað loysnin, sigur Johan Dahl.

Men hetta hevði eisini fingið týdning fyri alt landið, tí í vinnuni er semja um, at feskfiskaframleiðsla er vegurin fram hjá føroyskari fiskivinnu, men vit hava bara ikki flutningsmøguleikarnar til tað.

Sjálvur hevur hann ongan trupulleika av, at tað almenna stuðlar eini slíkari rutusigling, sum skapar nógv størri møguleikar hjá allari fiskivinnu í Føroyum.

Johan Dahl heldur enntá, at eisini nýggi Smyril eigur at verða tikin úr suðuroyarsigling eitt samdøgur um vikuna, har hann ístaðin siglur til Scrabster við fiski.

– Nýggi Smyril siglur so skjótt, at hann klárar ein slíkan túr upp á eitt samdøgu og so kann gamli Smyril sigla ímillum Suðuroynna og Havnina tað samdøgurið.

Aðrar dagar í vikuni kann so gamli Smyril sigla ímillum Føroyar og Skotland.

– Hetta kann lata heilt aðrar dyr upp fyri føroyskari fiskivinnu á feskfiskamarknaðininum í Evropa, eins og siglingin hjá Teistanum læt nógvar dyr upp, tað tíðina, hann sigldi.

– Men ikki minst kann hetta verða eitt týðandi menningartiltak fyri alla Suðuroynna, sum er í svárari kreppu, sigur Johan Dahl.

– Hartil er hetta eitt rættiliga bíligt tiltak, men tað kann fáa stóran týdning fyri Suðuroynna.

Hann heldur, at tekur tað almenna fasta rutusigling uppaftur til Skotlands, kann tað gera sítt til at byggja eina rutu upp, sum so kann mennast víðari, kanska við einum skjóttsiglandi skipi.

– Ein slík føst rutusigling hevði havt avgerandi týdning fyri framtíðina hjá Suðuroynni, sigur Johan Dahl.

# Suðuroyingar kunnu umhugsa at keypa Smyril

**– Eg dugi ikki at síggja, hvussu tað almenna aftur kann fara undir fasta rutusigling ímillum Føroyar og Skotland, sigur Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í innlendismálum, sum eisini umsitur Strandferðsluna**

FISKAFLUTNINGUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er ein spennandi tanki at fáa Smyril í fasta rutusigling ímillum Føroyar og Skotland. Men so kunnu suðuroyingar at kanna møguleikan fyri at keypa hann til endamálið.

Tað heldur Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í innlendismálum, sum eisini umsitur Strandferðsluna.

Hann hevur lagt merki til uppskotið frá vinnulívsfólkum um, at tað almenna setir Smyril í fasta rutusigling ímillum Føroyar og Skotland, tá ið nýggi Smyril er komin.

Tá halda vinnulívsfólk, at Smyril, sum nú er, hevði gjørt munandi betri gagn, enn hann ger um hann verður seldur, soleiðis sum landsstýrið ætlar.

Tá ið nýggi Smyril er komin, ætlar landsstýrið at selja hendan. Mett verður, at landskassin fer einar seks milliónir fyri hann, men summi siga, at prísurin verður neyvan omanfyri fýra milliónir.

Tí halda fólk í fiskivinnuni at tað hevði verið ein munandi betri loysn at sett hann í fasta rutusigling til Skotlands við fiskavørum, tí har eru vit ikki nóg væl fyri sum er, serliga ikki Suðuroy.

– Hetta er ein áhugaverdur tanki, heldur landsstýrismaðurin í innlendismálum. Men hann dugir ikki at hugsa sær, at tað almenna aftur skal fara undir farmaflutning ímillum Føroyar og Skotland.

– Eg dugi ikki at ímynda mær, at tað skal vera Strandferðslan, sum skal standa fyri slíkari sigling einaferð afturat, heldur Jógvan við Keldu.

– Skal Smyril setast í uttanlandssigling við fiski, vildi eg heldur mælt suðuroyingum til at keypt Smyril til endamálið, tá ið hann verður lýstur til sølu

– Tað, sum liggur í kortunum í løtuni, er, at tá ið nýggi Smyril er komin, skal hesim Smyrilin seljast av landinum.

– Men enn er onki hent. Og so longi onki er hent, so eru møguleikarnir opnir, sigur landsstýrismaðurin og tá ið Smyril verður til sølu, fer at bera til at bjóða upp á hann. Og tað kunnu suðuroyingar gera, antin einsamallir, ella saman við øðrum.

Men tað eru fleiri flutningsfeløg, sum sigla á privatum grundarlagi og eg haldi, at tað er ógvuliga lítið hugsandi, at tað almenna fer í kapping við tey um siglinging til Skotlands, sigur Jógvan við Keldu.

Hann vísur eisini á, at arbeitt verður við at einskilja Farmaleiðis, sum er flutningurin hjá Strandferðsluni á landi og so kann tað tykjast øvugt at fara undir flutning ímillum lond ístaðin.

Men verður málið reist, er tað rætt at viðgera tað í álvara, leggur hann afturat.



*Halda suðuroyingar, at teir hava brúk fyri betri flutningi, kunnu teir umhugsa at keypa Smyril, tá ið hann verður lýstur til sølu, sigur Jógvan við Keldu, landsstýrismaður*